# ICT-tøkningar til FT Samskifti

Kundi tú hugsa tær at arbeitt við samskiftistøkni í støðugari menning, við nógvum nýggjum avbjóðingum og í einum spennandi og broytiligum umhvørvi?

**Størvini**
Okkum tørvar fýra framtakshugað fólk til dátu- og teletøknitoymini á Rakstrardeplinum, har okkara dugnaligu starvsfólk leggja stóran dent á vitanardeiling og gott samstarv.

Uppgávurnar á Rakstrardeplinum eru bæði innanhýsis og mótvegis viðskiftafólkum og fevna um:
- rakstur og viðlíkahald av internet back-end og servaraskipanum til internettænastur
- rakstur og viðlíkahald av kjarnu skipanum til IP-, far- og fastnettelefoni
- rakstur og viðlíkahald av vekslaraskipanum og øðrum vinnutøkniloysnum
- stuðul hjá kundarøkt (2nd line support)
- tænastumenning á nevndu rakstrarøkjum

Dátutøknitoymið, ið hevur ábyrgdina av internet back-end og internet tænastum, søknast eftir einum **Serfrøðingi í hýsing** og einum **Serfrøðingi í servaraskipanum**.

Rætti umsøkjarin til dátutøknistørvini hevur EDV-útbúgving, tekniska útbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving, og tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur kunnleika til ella royndir í:
- Windowsskipanum, sum Exchange, MOM
- IIS/Apache vev-servara
- TCP/IP og interneti
- UNIX
- Forriting í Adobe GOLive, ASP, SQL, Perl., C++ og Visual Basic
- Framkomnum vevloysnum
- Klient/servara umhvørvi

Neyvari upplýsingar um størvini á Dátutøkni fáast við at venda sær til Páll Wiberg Joensen á tel. 303521 ella senda t-post til pwj@ft.fo.

Teletøknitoymið, ið hevur ábyrgdina av IP-telefoni, fartelefoni og fastnettelefoni skipanum, søknast eftir einum **Serfrøðingi í IP-telefoni** og einum **Serfrøðingi í fartelefoni**.

Rætti umsøkjarin til teletøknistørvini er verkfrøðingur, telduatstøðingur ella hevur aðra viðkomandi tekniska útbúgving, og tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur kunnleika til ella royndir í:
- SIP og IP-telefoni
- UNIX/LINUX
- TCP/IP, VPN, LAN/WAN
- Fartelefoni, Gprs/Edge
- Samskiftistøkni

Neyvari upplýsingar um størvini á Teletøkni fáast við at venda sær til Erland Jensen á tel 303534 ella senda t-post til erj@ft.fo.

**Persónligir eginleikar**
Felags fyri øll størv á FT Samskifti er, at vit ynskja starvsfelagar:
- ið eru opnir, duga væl at tosa við kundar og halda avtalur mótvegis kundum
- duga at arbeiða sjálvstøðugt og at taka ábyrgd
- eru nærlagdir og samstarvsfúsir
- hava góðan kunnleika til at lesa og skriva føroyskt, danskt og enskt

**Umsókn og freist**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag ella eftir førleikum.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera FøroyaTele í hendi í seinasta lagi týsdagin 2. januar 2007 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

"At stýra forritum er nakað tað sama sum at reka saman kettur"
- Greg Settle -



FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum!

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll støðarútgerð fyri fastnettelefoni og breiðband. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele



# Takk

**Nú 2006 er farið at halla, ynskir Javni við hesum at takka tykkum mongu, ið á ymiskan hátt hava stuðlað Javna í ár.**

Tøkk, tit, ið gjørdu okkum 35 ára føðingardagin so góðan og minniligan.

Tøkk, tit, ið gleddust saman við okkum á veitsluni.

Tøkk, tit mongu, bæði avvarðandi, politikarar og onnur sjálvboðin, ið gingu hús úr húsi í illveðrinum 11. november og seldu Javnaálmanakkan.

Tøkk fyri hjartaligu móttøkuna, seljarar okkara fingu, har teir komu á gátt.

Tøkk, tit listafólk, ið hava latið Javna málningarnar til álmanakkan.

Tøkk, øll tit, ið á ymiskan hátt og hvør á sínum øki hava virkað fyri at gera korini hjá teimum við menningartarni so virðilig, sum gjørligt.

Tøkk fyri hvørt vinarligt smíl og hvørja blídliga heilsan, tá ið tit hava hitt onkran við menningartarni á gøtuni.






**Hesir stovnar og hesi feløg hava á ymiskan hátt stuðlað Javna í 2006:**

Føroya Banki
Føroya Lívstrygging
Dimmalætting
Smyril Line
Stikkan
Norðoya Sparikassi
Verkstaðið Vón
Skósølan við Gøtugjógv
Føroya Sparikassi
Atlantic Airways
Føroya Tele
Tryggingarfelagið Føroyar
KJ Hydraulik
Normek
FOFISH
Røkt
Reproz
Nevið
Hvonn
Frakt & Sandsølan
Føroya Betongsaging
Hotel Hafnia
Jólamerkjagrunnurin
Happadráttargrunnurin
MBF
Vikubladið
Sosialurin

MBM
Viðareiðis Kommuna
Eiðis Kommuna
Leirvíkar Kommuna
Vestmanna Kommuna
Sands Kommuna
Runavíkar Kommuna
Fuglafjarðar Kommuna
Skálavíkar Kommuna
Nes Kommuna
Vágs Kommuna
Fámjins Kommuna
Sunda Kommuna
Klaksvíkar Kommuna
Hvalbiar Kommuna
Tórshavnar Kommuna
Sumbiar Kommuna
Sandavágs Kommuna
Miðvágs Kommuna
Porkeris Kommuna
Kall
Miðlon
Pizza 67
Poul Michelsen
Norðurlandahúsið

**Javni ynskir øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár, við tøkk fyri brátt farna árið.**

javni
– Virkin og virðismikil

REPROZ

Hoydalsvegur 40 · Postsmoga 1133 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 31 48 27 · www.javni.fo · javni@javni.fo